


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Fólkaflokkurin manipulerar við tølum



Val

MAGNI LAKSÁFOSS
Landsstýrismaður

Tey, sum hava hug at eftirkanna ósanna pástandin hjá fólkafloksmanninum Bjarna Djurholm um, at rakstrarútreiðslurnar eru øktar 355 mió.kr. eftir einum ári, kunnu hyggja í ein faldara, sum embætisfólk í Fíggjarmálaráðnum hava skrivað. Har kann staðfestast, at rakstrarútreiðslurnar í veruleikanum eru øktar 206 mió.kr.

Byrjandi valstríðið í Føroyum fevnir tíverri um eitt kríggj um tøl. Seinasti leikurin hjá Fólkaflokkinum er at reingja tøl um rakstrarútreiðslurnar hjá føroyska samfelagnum. Tíbetur kunnu veruligu tølini skjalprógvast av óheftum keldum.

**Djurholm manipulerar**
Í grein í bløðunum leggur Djurholm undirritaða undir at hava økt rakstrarútreiðslurnar við 355 mió. kr. ella 9,5 prosentum eftir einum ári.

Staðfestast kann, at landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum velur ikki at halda seg til sannleikan. Í staðin manipulerar hann við tølunum.

**Objektiv tøl finnast**
Tað kann vera torført hjá fólki at finna fram til røttu tølini, og tað er helst hetta, Djurholm roynir at gera sær dælt av við sínari talmanipulatión.

Tíbetur framleiða embætisfólk í Fíggjarmálaráðnum á hvørjum ári ein faldara, har tey týdningarmestu tølini eru savnað, og embætisfólkini gera viðmerkingar til tølini.

Framleiðslan av faldaranum fer fram púra leyst av politiska myndugleikanum.

Faldarin er at finna á www.fmr.fo, og tú skal hyggja undir teigin ‘Fíggjarlóg’.

**Veruligu tølini**
Niðanfyri eru árini 2007 og 2008 endurgivin úr talvuni á síðu 34 í faldaranum. Býtið millum rakstur og løgur er soleiðis, at meðan raksturin veksur við 206 mió. kr. minka løgurnar og rentuútreiðslurnar við 105 mió. kr. Vøksturin í útreiðslunum tilsamans er tískil 101 mió. kr.

Sostatt er langt millum sannleikan og tær 355 milliónirnar hjá Djurholm. Best og rættast hevði verið, um Djurholm helt seg til sannleikan.

Fyri rættleikans skyld skal tó viðmerkjast, at ætlanin er at brúka aðrar 65 mió. kr. í løgum, uttanum fíggjarlógina hjá landskassanum, at útbyggja flogvøllin við. *Sí talvu*

**Vøksturin í lagi**
Ein kann tó framvegis halda, at ein vøkstur í rakstrinum á 206 mió. er ov nógv, men her skulu vit minnast til, at nøkur serlig viðurskifti, sum eisini eru nevnd á síðu 35 í faldaranum, hava stóra ávirkan á raksturin í 2008.

Hetta er MVG-stuðul til sethúsabygging, rentustuðulin og FAS-skipanin. Tilsamans ávirka hesi trý viðurskifti rakstrarútreiðslurnar við væl oman fyri 50 mió. kr.

Eftir eru sostatt umleið 150 mió. kr., sum fyri stóran part eru lønir. Um vøksturin skuldi verið minni, hevði verið neyðugt at sagt fólk úr starvi. Hvørji skuldi tey verið? Lærarar úr fólkaskúlanum? Starvsfólk í ellisheimum og sjúkrahúsum? Ella skuldu vit í staðin minka pensiónirnar? Tað kundi verið áhugavert at hoyrt sjónarmiðini hjá Fólkaflokkinum um hetta!

Hetta hevði ikki samsvarað væl við, at vit eru noydd til at gera meiri við PISA-trupulleikan og eldraøkið. Tí er eingin ivi í míni verð, at vøksturin, sum er rættiliga væl minni, enn Djurholm postulerar, er í lagi.

**Fólkaflokkurin rennur undan ábyrgd**
Formaðurin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen, og harvið allur flokkurin, hevur nú annars verið alment frammi í Degi og Viku og staðfest tað, sum onnur hava vitað leingi. Nevniliga, at Fólkaflokkurin ikki tekur undir við einum ábyrgdarfullum búskaparpolitikki, har vit fylla goymslurnar í góðum tíðum fyri at hava nakað til at taka, um tíðirnar gerast verri.

Hetta undrar neyvan nakran, ið hevur samstarvað við Fólkaflokkinum. Hinvegin er gott at fáa tað staðfest alment.

| Mió. kr. (netto) | 2007 | 2008 | *Vøkstur 2007-8* |
|---|---|---|---|
| Rakstur | 3.875 | 4.081 | *206* |
| Løgur | 288 | 195 | *-94* |
| Rentur | 9 | -2 | *-11* |
| **Tilsamans** Í prosentum | 4.172 | 4.273 | ***101*** *2,4* |

# Altjóða flogvøllur



Val

BJARNI DJURHOLM

**Bygging av altjóða flogvølli helst stórsta avbjóðingin næstu árini**

Innlendis ferðslumøguleikarnir, sjóvegis sambandið burtur í heim og ikki minst samskiftismøguleikarnir eru í dag á høgum støði. Kortini er tað nakað sum haltar alvorliga. Tað er loftvegis sambandið við umheimin. Hesin parturin er vorðin ein alsamt vaksandi fløskuhálsur.

Í einum modernaðum samfelagi gerst flúgving og flogvinna meira og meira týdningarmikil fyri búskapin. Flytiføri vísir seg at vera avgerandi fyri menningina og ikki minst fyri og hugin hjá fólki at støðast í Føroyum.

Flúgving til og úr Føroyum kann tí vísa seg at vera týdningarmiklasta fortreytin hjá virkjum og einstaklingum at realisera sín gerandisdag.

Tí er bygging av nýggjum flogvølli helst stórsta avbjóðingin næstu árini. Væntandi byrjar dagføringin á Vágum í 2008, meðan kanningarúrslitini av nýggjum flogvølli vera tøk um eini 3 ár. Tá kann politiski myndugleikin taka endaliga avgerð í málinum.

Kunnu vit ikki bjóða vinnu og einstaklingum javnbjóðis, og helst betur umstøður at virka og liva í Føroyum, hvussu kunnu vit so vænta, at virkisfús, vælútbúgving og visioner fólk vilja støðast her?

Tí eru optimalir samskiftismøguleikar treytin fyri, at vit røkka setninginum í vinnupolitikkinum, at vit vinnuliga gerast ein møguleiki og avbjóðing, sum okkara útisetar og onnur velja til heldur enn frá.

**Kanningar í gongd**
Farnu árini hevur løgtingið eisini játtað Vinnumálaráðnum 500tús. árliga, sum eru nýttar at kanna flogvallaviðurskiftini í Føroyum. Landsverk hevur staðið fyri arbeiðinum.

LV bað norsku altjóða fyritøkuna AsplanViak um at gera heildarmeting fyri alt landið. Allar niðurstøðurnar eru eftirmettar av norskari, svenskari og íslendskari serfrøði. Harumframt eru tær kvalitetssikraðar av Rambøll.

Økini, sum eru kannað, eru Skorhæddin, Glyvursnes og Søltuvík. Síðani eru Nólsoyggin og Svínoyggin eisini lýstar. Fyribilsniðurstøðan er, at vind- og veðurmátingar verða gjørdar á Glyvursnesi og Søltuvík.

Fyri stuttum samtykti løgtingið ”Uppskot til samtyktar” um fyrireiking av verklagslóg um at byggja altjóða flogvøll í Føroyum skjótast gjørlig.

Løgtingssamtyktin er í samsvari við og stuðlar undir arbeiðið sum nú í nøkur ár er gjørt av Vinnumálaráðnum. Uppskotið til samtyktar eru tíverri ikki bindandi. Tí var tað spell, at uppskotið ikki varð orðað sum lóg. Hevði tað verið, so var slóðað fyri einaferð með alla fyri, at altjóða flogvøllur verður gjørdur í Føroyum.

Undirritaði vil tó framhaldandi gera alt fyri, at hetta áleikandi mál verður loyst.

# Sjúklingatryggingarlógin og Endurgjaldsábyrgdarlógin enn ikki settar í gildi



Val

EILEEN SANDÁ
Sjálvstýrisflokkurin

Nú eru knapt 10 ár liðin, síðan lógirnar um sjúklingatrygd, endurgjaldsábyrgd og vanlukkutrygging vóru til viðgerðar á Føroya Løgtingi, og tær hava verið til viðgerðar fleiri ferðir síðan, men enn eru tær báðar fyrstnevndu ikki settar í gildi í Føroyum. Tó varð lógin um sjúklingatrygging viðtikin á Føroya Løgtingi í januar 1999 eftir at Sjálvstýrisflokkurin legði hana fram, men hon kann ikki setast í gildi fyrr enn Endurgjaldsábyrgdarlógin (Lov om erstatningsansvar) verður sett í gildi í Føroyum, og Endurgjaldsábyrgdarlógin kann ikki setast í gildi fyrr enn nýggj vanlukkutryggingarlóg er sett í gildi, (sambært fyrispurningi 100-24 frá 2005). Verandi vanlukkutryggingarlóg er frá 1966. Í Danmark kom nýggjari lóg í 1978 í staðin fyri tað gomlu “Ulykkesforsikrings loven”, tann nýggja verður nevnd Arbejdsskadesikring sloven. Í 2007 kom aftur ein nýggj lóg ístaðin fyri ta fyrru, henda nevnist Arbejdsskadeloven, kunngerðin eitur “Bekendtgørelse af lov om arbejdsskadesikring”. Tað sær út til, at vit yvirhøvur ikki fylgja við á lógarøkinum sum gevur borgarum okkara rættartrygd, við tað at ein persónur kann fáa endurgjald, um hann/hon hevur verið úti fyri arbeiðsvanlukku. Lógin frá 1966 er yvir 40 ára gomul og má vera avolda, tað hendir jú so nógv nýtt á arbeiðsmarknaðinum, at lógirnar mugu endurnýggjast, so hvørt sum tørvur er á tí.

Ein avleiðing av, at sjúklingatryggingarlógin ikki er sett í gildi enn, er tann at sjúklingar, ið fáa skeiva viðgerð í føroyska heilsuverkinum, skulu sjálvir kunna prógva, at ein feilur er hendur. Ikki allir sjúklingar hava orku til tað, meðan tey eru sjúk. Um feilurin var farin fram á t. d. einum donskum sjúkrahúsi, so var tað als ikki neyðugt hjá sjúklinginum at prógva nakran feil. Har er tað grund nokk til endurgjald, um skaðin við rímiligari vissu kann sigast at verða komin orsaka av (...) og so verða 4 ymiskar grundir nevndar í lógini (sí nærri www.patientforsikringen. dk/loveogpraksis/ patientforsikringsloven. html). Lógin vísir í fleiri førum til endurgjaldsábyrg darlógina, men henda er ikki sett í gildi í Føroyum enn, hóast hon hevur verið løgd fyri Løgtingi 3 ferðir í 1999, 2002 og 2003 (samb. www.logting.fo). Eg dugi ikki at síggja, um hon hevur verið fyri nýliga.

Í komandi valskeiði eiga allar tríggjar lógirnar at setast í gildi skjótast møguligt. Tað er ikki rímiligt, at føroyskir sjúklingar eru verri fyri enn sjúklingar úr okkara grannalondum, tá tað ræður um at fáa endurgjald fyri skeiva viðgerð o.l. Danska sjúklingatryggingarlógin “Patientforsikri ngsloven” frá 1997 er longu sett úr gildi í Danmark og ístaðin er sett í gildi at virka frá 1. Januar 2007 www.patientforsikringen.dk/loveogpraksis/lo vomklageogerstatningsadg ang..html" "Lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet". Vit eiga tí ikki bert at hyggja eftir tí gomlu lógini frá 1997 men eisini tí nýggjastu lógini frá 2007. Tað týdningarmiklasta av øllum er tó, at allar lógirnar á hesum øki verða settar í gildi skjótast gjørligt til tess at rættartrygdin hjá føroyingum kemur í hásæti – bæði innan og uttanfyri heilsuverkið.